## DAGSINS MEINING

# Eitt afturlatið land

Hendingarnar kring stjóran í SEV hava enn einaferð avdúkað, at SEV er eitt afturlatið land. Henda áskoðan á SEV hevur ofta verið frammi í fjølmiðlum og á umboðsnevndarfundum, men sjáldan hevur hetta ført til størri opinleika ella meira gjøgnumskygni. Hvat er tað fyri leikur almenningurin hevur upplivað í seinastuni? Vit hugsa ikki so nógv um tað heilt ítøkiliga málið, men um skipanina sum heild. Men kortini: tað stutta av tí langa er, at pressan, her ikki minst sjónvarpið við gravandi journalistikki, avdúkar, at SEV-stjórin møguliga er ógegnigur í sambandi við avgerðir, hann hevur tikið sum SEV-stjóri, samstundis sum hann er formaður fyri partafelagsnevndini hjá P/F Vágatunnlinum. Kjarnan í hesum er, at hevði pressan ikki havt tikið málið upp, so hevði spurningurin ikki verið reistur. Ikki fyrr enn pressan fer inn í málið vakna nevnd og umboðsnevndarformaður! Hesi áttu at havt reagerað fyri langari tíð síðani ja, tann dagin stjórin var tilevndur formaður fyri P/F Vágatunnlinum. Í hvussu er átti man tá at reist spurningin innanhýsis, um nakar gegnistrulleiki kundi standast av tí.

Afturat hesum kemur, at ein hevur varhugan av, at nevndin í SEV ikki hevði tikið spurningin um gegnið stjórans upp, um formaðurin í umboðsráðnum ikki var farin til verka. Tað gjørdi hann og tað tænir honum til heiðurs. Hinvegin situr almenningurin eftir við eini mynd av einum afturlatnum og ódemokratiskum felagsskapi. Tá nevndarformaðurin verður spurdur, hvat í roynd og veru er farið fram, svarar hann, at nú eru vit samdir og meira er ikki at tosa um! Hvat annað er farið fram er almenninginum óviðkomandi! Hetta er sama loynibryggið sum so oftani við SEV. Hetta kann ikki góðtakast. Vit eiga øll SEV. SEV er ein almennur kommunalur stovnur og ikki ein privatfyritøka. Almenningurin hevur rætt at vita um alt, sum gongur fyri seg innanveggja í SEV eins og í øðrum almennum stovnum, og tað eigur tí ikki at verða góðtikið, at almenningurin ikki fær alt at vita. Av hesi orsøk er tað spell, at eingin løgfrøðilig kanning verður gjørd. Ikki til tess at hongja persónar út ella finna syndabukkar men fyri at rudda upp í eini skipan, sum treingir til nútímansgerð sæð út frá einum almennum sjónarmiði.

Nú minnir úrslitið mest um ein rossahandil: Stjórin góðtekur at sleppa nevndarsessinum í Norðoyatunnellinum – afturfyri sleppur hann undan kanning! Hetta er møguliga ein skilagóð loysn fyri allar partar, men vit eiga ikki at góðtaka, at nevndin dylur fyri almenninginum, hvat veruliga er farið fram. SEV hevur allar dagar verið eitt afturlatið land. Tíðin er farin frá hesum politikki. Vit liva í einum demokratiskum kunningarsamfelag. Hetta samfelag eigur ikki at góðataka nakað slag av loynibryggi innan almennar stovnar. Kommunalir stovnar eiga ikki at verða undantiknir. Nevndin og umboðsnevndarformaðurin gera tí klókt í at leggja øll kort á borðið. Lat tað verða undirstrikað her, at hetta skal ikki skiljast sum nakað persónligt álop á stjóran í SEV. Her er talan um prinsipp. Er vitan og orka hansara so týðandi fyri komandi Norðoyartunnilin, so eigur at bera til at brúka hana á annan hátt. Tá avgerð nú er tikin um, at hann skal ikki vera formaður fyri nevndini, so kundi hann verið brúktur sum ráðgevi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Yvirlýsing og áheitan frá Vága Sambandsfelag

Viðvíkjandi nýtslugjaldinum av Vágatunlinum:

• Vága Sambandsfelag kann ikki undir nøkrum umstøðum góðtaka kunngjørda prísin, ið er alt ov høgur og ein beinleiðis hóttan ímóti oynni.

• Vága Sambandsfelag ásannar, at príslegan á Vágatunlinum er so høg, at prísurin minst eigur at lækkast niður í helvtina av tí nú lýsta prísinum.

• Vága Sambandsfelag vil við hesum heita á Føroya Løgting, um at lække gjaldsskylduna hjá pf Vágatunlinum, við at landið tekur á seg rakstarskyldurnar av tunlinum, eins og tað ger á tunlum og brúgvum millum oyggjar ídag. Á hendan hátt kann prísurin lækkast, eins og nýtslan og samfelagsnyttan verður størri av anlegginum.

• Vitandi um, at uppskot verður lagt fyri Føroya Løgting viðvíkjandi hesum, vil Vága Sambandsfelag inniliga heita á Føroya Løgting og pf Vágatunnilin, um at arbeiða skjótt við málinum, soleiðis at lægri prísurin verður settur í verk, áðrenn tunnilin opnar 10.dec í ár.

*Vinarliga*
*vegna Vága Sambandsfelag*
*Jan Johannesen, formaður*

# Stavið við Lugo

**Andreas Hammer hevur gjørt fløguna Stava við Lugo, sum kann brúkast sum hjálp til at læra at stava**




FLØGUÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út teldufløguna Stava við Lugo. Andrias Hammer hevur gjørt innihaldið og forritað. Stava við Lugo er lærandi og mennandi telduforrit við fýra uppgávusløgum, myndum og teknifilmi. Lugo er ein animeraður 3D figurur, sum hjálpir barninum at stava. Í teimum fýra uppgávusløgunum eru 20 uppgávur til hvørt uppgávuslag, umframt 20 putlispøl og myndir at skriva út. Barnið fær góða vegleiðing, meðan spælt verður.

Áður hevur Andrias Hammer forritað teldufløgurnar Lítli reyði bilur og Lær teg bókstavirnar, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags eisini hevur givið út, umframt Rokna, sum eins og Lær teg bókstavirnar eru undirvísingarforrit. Lítli reyði bilur, sum kom út til jóla 2000, var fyrsta føroyska teldutøka útgávan til børn á føroyskum og framleidd í Føroyum. Fleiri útgávur eru á veg, eitt nú Tummas Dreki, sum eru fýra barnabøkur við eini teldufløgu til hvørja bók. Verður undirtøkan av Stava við Lugo góð, fer Andrias Hammer undir næstu fløguna við Lugo.

Andrias Hammer stendur sjálvur fyri umbróting, repro og prenti. Katrin Hammer lesur upp. Stava við Lugo kostar kr. 249 í bókabúðunum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Karr – eitt nýtt yrkingasavn frá Steinbjørn B. Jacobsen

FANNIR
*Tíðindaskriv*



Siglir tú undir bjørgum, hoyrist lomvigakarr, og kanska er eitt lítið karr av eystri. "Karr" eitur yrkingasavn, sum Steinbjørn B. Jacobsen júst hevur latið úr hondum.

Steinbjørn er føddur í Sandvík í 1937. Úti við tríati ára gamal gav hann út fyrsta yrkingasavn sítt, og árini fram móti aldaskiftinum gav hann út fleiri søvn. Á seksti ára degi skaldsins í 1997 gav forlagið Fannir út heildarsavnið "Tinna og tám". Nú gevur sama forlag út nýtt savn við yrkingum, ið yrktar eru hesi seinastu árini.

Sjálvt heitið á savninum kemur fyri í yrking, sum leitar sær íblástur frá Jesaja profeti: "Troysta ikki á menn, ið bert hava lítið fleyr av anda í nasum sínum, hvat virði hava teir?"

Her er eisini hugtakandi yrkingakringur, tíggju yrkingar um nakrar av málningum Mikines-málarans, og ikki óvæntað eru í savninum yrkingar, ið nerta við tað sjálvbjargnisstríð, vit føroyingar enn standa í. Men Steinbjørn er ikki tjóðskaparskald í trongari merking. Ein samtíðarmaður hevur skrivað soleiðis um hann:

"Man ikki Steinbjørn vera tann føroyskasti yrkjarin av øllum før-oyskum yrkjarum, sum nú eru á lívi? Nú heldur onkur meg hugsa um tjóðskaparmannin. Nei, eg hugsi um tann ljómbotn, ið litar skaldsins hug, sum fær megi og mál úr føroyskari náttúru, á sjógvi og landi, í á og fjøru, í líðum, á tindum, í gjótum og giljum, í dølum og botnum, í skriðum og eyreygum, í urðum og bjørgum - allastaðni."

Bárður Jákupsson hevur gjørt vakra kápu til bókina. Hon kostar 100 kr.

# Formula.fo hugsar um umhvørvið

**Formula.fo er við í eini størri altjóða umhvørvisætlan, har gamlar maskinur verða tiknar innaftur við endurnýtslu fyri eyga**

UMHVØRVI
*Tíðindaskriv frá Formula.fo*

Hvørki á skrivstovum ella í privatum heimum, hevur teldan langa livitíð. Tað ganga ikki meir enn tvey ár til teldan vanliga verður skift út við eina nýggjari og skjótari teldu. Tær gomlu teldurnar verða so burturbeindar.

Sama er við kopimaskinum og printarum. Tað av størsta týdningi, at tær ikki enda sum vandamikið burturkast á vanligu ruskdungunum, tí í hesum elektroniska burturkasti eru nógv evni, ið ikki mugu vera latin út í náttúruna.

Á hvørjum ári sendir Formula.fo fýra bingjur fyltar við teldum, printarum, kopimaskinum og øðrum elektroniskum útbúnaði av landinum til endurnýtslu.

Formula.fo er við í eini størri altjóða umhvørvis0-ætlan í sínum samstarvi við fyritøkur sum Xerox.

Útreiðlslurnar av hesum útflutningi eru um 100.000 kr. árliga, men Formula.fo metir at tað vera eina neyðuga og skilagóða útreiðslu umhvørvinum til frama.

Tað elektroniska burturkastið, sum Formula.fo sendir av landinum, er brúktar kopimaskinur, printarir, teldur, tónaraíløt, fotoreceptorar, returemmballaga v.m.

Hetta burturkast verður sent til tann stóra altjóða endurnýtslu miðdepilin hjá Xerox í Venray, Hollandi.

Sum nú er, verða 93% av lutunum endurnýttir, men miðað verður ímóti 100% endurnýtslu.

### Nýggj tøkni.

Nýggjar teldur og kopimaskinur verða harafturat útvikla̧ðar við endurnýtslu í huga. Hetta av tí at rávørutilgongdin ikki heldur fram í ævir, og Xerox ynskir at varðveita tey tilfeingi sum vit longu hava.

Afturat hesum nýtir Xerox bert "grønt" pakkitilfar til allir sendingar, hetta merkir pappír og pap sum kann endurnýtast, saman við innsavnan og endurnýtslu av brúktum pakkitilfari.

### Umhvørvisgóðkenningar

Hin 15.juli 1996 fekk Xerox, sum hitt fyrsta virkið innanfyri sítt øki, evropeiska umhvørvisprísin: "The European Better Environment Award for Industry", sum verður latin av ES. Hendan virðislønin varð júst givin vegna endurnýtslu- skipanina hjá Xerox.

Sum liður í ISO 14001 góðkenningini Xerox bjóðar øllum viðskiftafólkum at taka lut í einifrívilligari og ókeypis UmhvørvisRetur skipan, hvar brúktar Xerox-eindir so sum skermar, tónaraíløt, fotoreceptorar, v.m. verða savnaði inn og aftursend til endurnýtsluvirkið í Venray í Hollandi. Hendan skipan er sum tann einasta í Danmark góðkend af danska Umhvørvismálaráðnum.

Og sum tann fyrsta fyritøkan av sínum slagi megnaði Xerox eisini tann 28 juni 2001 at fáa góðkenning eftir tí nýggjasta kvalitetsstandardinum- ISO 9001 versión 2000. Hetta vil siga, at fyritøkan hevur eina kvalitets- og umhvørvisskipan at arbeiða eftir, sum

# Teknmálstulkaða “Dagur & Vika” í vanda!

TÍÐINDASKRIV FRÁ DEYVAFELAG FØROYA

Deyvafelagið og foreldrafelagið hava í mong ár stríðst við at fáa tíðindasendingarnar hjá SvF – Dagur&Vika - tekstaðar, teknmálstulkaðar og endursendar, so teir deyvu føroyingarnir kundu fáa høvi at fylgja við í tí, ið fyriferst bæði í okkara samfelag og annars kring allan knøttin.

Eftir at Svf fekk nýggjan stjóra, sum hevur verið sera positivur mótvegis ynskjunum hjá Deyvafelagnum, eydnaðist við hansara hjálp at finna útvegir, so byrjast kundi. Og síðan hevur Dagur & Vika verið teknmálstulkað og endursend forskotin til stóra gleði fyri tey deyvu. Men ikki bert tey deyvu hava gjørt vart við, at tey eru væl nøgd, at tíðindasendingin verður endursend. Eisini nógvir hoyrandi persónar hava gjørt vart við sítt nøgdsemi yvirfyri Deyvafelagnum.

Deyvafelagið ynskir at gera vart við sítt takksemi mótvegis øllum teimum, ið hava gjørt tað møguligt at byrja hesar sendingarnar.

Fyrst og fremst vilja vit takka Sjónvarpi Føroya og tá serstakliga Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóra fyri stuðulin hagani. Vit takka eisini Mentamálaráðnum, at ráðið játtaði okkum so mikið av peningi, burturav játtanini til “Framleiðslu av føroyskum fjølmiðlatilfari”, so at byrjast kundi. Men vit fara avgjørt ikki at gloyma Teknmálstulkatænastuna og tulkarnar har, sum eru farnir so positivt til verka og higartil hava avgreitt sendinginar eina fyri og aðra eftir við góðum úrsliti!

Óneyðugt er helst her at gera vart við, at tey deyvu einans fáa sína vitan inn gjøgnum eyga. Tey fáa t.d. einki burturúr Útvarpinum, tá tey ikki hoyra. Øll kunnu tí ikki skilja, hvussu týdningarmikið tað er fyri tey deyvu at hava fingið hesar sendingarnar, og sjálvsagt hvussu avbera neyðugt tað er, at sendingarnar fara at halda fram!

### Sponsorar søkjast!

Men nú tykist vandi verða á ferð!

Áðrenn árslok verður játtaði peningurin uppi, og sendingarnar verða sostatt steðgaðar, um ikki annar peningur verður fingin til vega.

Deyvafelagið hevur søkt Mentamálaráðið um meira pening, men hevur fyribils fingið avslag við teirri grundgeving, at einki er eftir av játtaðu upphæddini fyri fíggjarárið 2002.

Vit í Deyvafelagnum loyva okkum við hesum at heita á allar fyritøkur, felagsskapir, bankar, oljufeløg ella onnur (tó ikki í hesum umfarinum privatpersónar) at bjóða seg fram sum sponsorar!



Tað kostar umleið kr. 6.800,00 um vikuna at fáa teknmálstulkað og avgreitt tær fýra Dagur & Viku - sendingarnar (men vit vildu so fegin fingið ráð til nakrar av hinum føroysku sendingunum eisini), og vit siga tøkk bæði fyri størri og minni stuðulsupphæddir, og vit fara við gleði at kunngerða nøvnini á teimum, ið vilja stuðla okkum.

Deyvafelag Føroya, Íslandsvegur 10B, Postrúm 2001, 165 Argir. Telefon nr. 317 597.